**Hevur tú hug at verða dómari?**

RSF fer undir eina tilgongd, at víðka um talið av dómarum tey komandi árini og sóknast tískil eftir áhugaðum fólkum, ið kunna traðka inn í dómaratoymið. Ætlanin er, at seta tríggjar í 2016 og tríggjar í 2017.

**Uppgávur hjá dómaratoyminum eru:**

- At virka sum høvuðsdómarar
- At virka sum startdómarar
- At hava eftirlit á startinum (Stangarmaður/kvinna)
- Samskifti við stevnufyrireikarnar uppundir stevnir
- Samskifti við RSF og rógvarar

RSF settir bert eina treyt og er hon, at ein er ágrýtin og brennir fyri kappróðri. Harafturat er tað ein fyrimunir, at man hevur royndir við:

- At hava róð kapp
- At hava verið við til at fyrireika stevnir ella róðrartiltøk
- Kappróðrar arbeiði í feløgum

Ætlanin er, at tann praktiska tilgongdin byrjar á Eystanstevnu og Vestanstevnu í ár, tískil er freistin at søkja sett til 1. Juli. Áhugaði kunna senda eina umsókn til rsf@olivant.fo.

Eru spurningar, kunna tit seta tykkum ísamband við Kristian Eli Zachariasen, fartelefon 215727 ella á mail rsf@olivant.fo

Við vón um góða móttøku
Róðrarsamband Føroya